FYRISKJAL 6

Til Mentamálaráðið
Tinghúsvegur 5-7
FO-100 Tórshavn

Tórshavn 21. januar 2021

Hoyringssvar til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um miðlastuðul

Føroysk Miðlafólk takka fyri møguleikan at geva okkara sjónarmið til kennar, nú landsstýrismaðurin ætlar at broyta galdandi miðlastuðulsskipan.

Lat tað vera sagt beinanvegin, at útgangsstøðið – at hækka dygdina í journalistiska arbeiðinum – er gott. Leisturin, ið lagt verður upp til at brúka frameftir, hevur tó fleiri avbjóðingar við sær.

Fyri tað fyrsta kann tað fáa neiliga ávirkan á privatu miðlarnar, at verandi stuðul í útgangsstøðinum blívur burtur. Sambært prentaðu bløðunum eru útreiðslurnar til útbering øktar munandi, og hava hesar etið upp meginpartin av miðlastuðulspengunum. Føroysk Miðlafólk hava ikki møguleika at meta um, hvussu miðlaleiðslurnar fara at leggja komandi fíggjarár til rættis, tá tær sum útgangsstøði ikki hava miðlastuðulspengar við í fíggjarætlanini. Sum fakfelag kunnu vit tó óttast spariátøk, ið koma at merkjast á redaktiónunum.

Vit taka fyri givið, at tað skal vera ein blaðstjóri ella redaktørur á einum fjølmiðli, sum stendur aftanfyri hvørja einstaka umsókn um miðlastuðul.

Miðlastuðulsnevndin fær við nýggja leistinum eina stóra uppgávu at loysa. Hon skal í prinsippinum viga tær redaktionellu avgerðir, sum miðlaleiðslurnar taka, tá tær seta út í kortið journalistiskar ætlanir.

Tað krevur nógv, bæði av nevndini sjálvari og teimum umsóknum, ið hon fær at taka støðu til. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið stendur, at *"Treytir fyri stuðlinum skulu ásetast í kunngerð, og krøv til umsóknina verða ásett, eitt nú um verkætlanarlýsing, undir hesum, hugskot og førleikar hjá umsøkjara. Ásettar verða eisini reglur fyri vav av verkætlan, t.e. at væntandi verður eitt minstamark og eitt hægstamark sett fyri tíðina, ein verkætlan, ið fær stuðul, kann vara."* Tað hevði verið greiðari, um hesi viðurskift vórðu lýst nærri beinanvegin.

Samstundis sum uppgávan hjá Miðlastuðulsnevndini verður munandi meira krevjandi, so má skipanin ikki gerast ov tung ella stirvin. Tí innbygt í journalistiskar verkætlanir er ofta ein aktualitetur, sum krevur skjótar avgerðir.

Eftir nýggja leistinum verður tað samanumtikið eitt redaktionelt, journalistiskt val, ið liggur aftanfyri hvørja einstaka umsókn um miðlastuðul. Tí eigur Mentamálaráðið at umhugsa, hvørt journalistiska umboðanin í Miðlastuðulsnevndini eigur at styrkjast.

Føroysk Miðlafólk eru sjálvandi til reiðar at umrøða málið nærri, bæði við landsstýrismannin á økinum og tá lógaruppskotið verður viðgjørt í løgtingsnevnd.

Vinarliga, vegna Føroysk Miðlafólk

Jón Brian Hvidtfeldt, formaður